

# DAR Á
# UM

**VINNUKAVING**

*Ingi Sørensen hevur eina altjóða viðurkenda útbúgving sum vinnukavari heilt niður á 50 metra dýpi, har luftforsýning av yvirflatuni er kravd*

*Sjálvsmynd*

minst 20 metrar djúpir, og eru eisini í fleiri førum festir á 40 metra dýpi, sigur Ingi Sørensen.

Hann heldur, at »går den så går den«-hugburðurin hevur fótafesti á økinum, og hóast talan kann vera um menn, sum hava kava í áravís, so høvdu teir ongar sømdir fingið fyri tað á einum vinnukavaraskúla undir eftirliti, undir ongum umstøðum.

- Í Føroyum er einki eftirlit á økinum, og Arbeiðseftirlitið hevur góðkent útbúgvingar í fleng, sjálvt um teir vita, at hesar ikki verða góðkendar uttan fyri Føroyar. Nú situr ein trímanna bólkur við óavmarkaðum heimildum og góðkennir vinnukavarapappírir til frítíðarkavarir, sum teir halda vera egnaðir til at sleppa undan skúling. Á altjóða góðkendum vinnukavaraskúlum vera als ongin undantøk givin. Eingin av teimum í trímanna bólkinum hevur útbúgving innan vinnukaving yvirhøvur. Gud viti hvat tað næsta verður, kanska eitt sakarmál um ærumeiðing, fyri at flyta fokusið langt vekk frá tí manglandi førleikanum, ið myndugleikarnir leggja fyri dagin, leggur Ingi Sørensen aftrat.

## Djúpt óseriøst

Vinnukavararnir hava fleiri ferðir roynt at fingið ein dialog í lag við Arbeiðseftirlitið, men einki er komið burtur úr tí.

- Hvørki Arbeiðseftirlitið ella Jóhan Dahl, landsstýrismaður, sum vit hava havt fund við, hava latið við seg komið. Landsstýrismaðurin sigur seg arb. við málinum, men tað sær út til, at alt bara fær loyvi at flóta á økinum, og at eingin vilji er til at fáa skil á hesar útbúgvingarnar, sigur Ingi Sørensen.

- Teir halda kanska, at nú er sloppið, tí nú er vinnukavaraskúli settur á stovn í Føroyum og kanska hava teir rætt, tí vit hvørki orka ella tíma at halda fram við at vísa á allar skeivleikarnar. Avleiðingin er, at menn við veruligum altjóða góðkendum vinnukavarapappírum finna sær annað yrki, tí at frítíðarkavarir hava trýst prísin fyri vinnukaving í botn og hava yvirtikið so at siga alla vinnuna. Tað eru fleiri, ið eru farnir í annað yrki, sigur Ingi Sørensen.

Hann sigur, at sjálvt í Suðuramerika og í tí svartasta Afrika er betri skil á innan kavaraútbúgvingar enn í Føroyum.

- Tað er djúpt óseriøst at loyva vinnukavaraútbúgving í Klaksvík, fyri tað fyrsta tí eingin kvalifiseraður undirvísari er. Tað er kostnaðarmikið at seta á stovn ein slíkan skúla, útmóti 10 milliónir krónur. Tað má vera óalmindiliga lítið teir hava brúkt uppá útgerð í Klaksvík, samstundis gevur skeiðið har einans loyvi til at nýta hondsamboð, tað vil siga hamara og tong. Tá ið oljuvinnan einaferð fer at taka seg upp her hjá okkum, fara teir at flenna og rista uppá høvdi eftir okkum, um hettar verður kosturin. Annars svarar tað til, at vit settu ein flogskiparaskúla á stovn í Føroyum, tí vit hava Atlantic Airways, sigur Ingi Sørensen, sum sjálvur heldur tað vera fullkomuliga burturvið, at seta á stovn Vinnukavaraskúla í Føroyum.

Hann ivast ikki í, at slíkt ábyrgdarloysi fer at føra til miss av mannalívi.

- Tað er púra vist, at tá farið verður so lættliga um eina so álvarsliga undirvísing, so fer tað at føra til, at mannalív fara fyri skeyti. Og tað er ófyrigeviligt, at politisku myndugleikarnir og Arbeiðseftirlitið skal lata tað koma so vítt, áðrenn álvarin gongur upp fyri teimum, sigur Ingi Sørensen.

Hann heldur, at tað er bara eitt at gera, og tað er at kopiera ta norsku vinnukavaralógina og dagføra hana hvørja fer normenn gera tað.

- Norsk Yrke Dykkerskole er ein sera góður skúli og tekur við gleði ímóti føroyingum, ið vilja hava altjóða førleika innan vinnukaving. Hvussu ringt kann tað vera, spyr Ingi Sørensen at enda.

leo@sosialurin.fo




**VINNUKAVING**

*Sum flestu aðrir vinnukavarar í Føroyum hevur Ingi Sørensen verið noyddur at søkja arbeiði uttanlands, tí frítíðarkavarar við lættisoppaloyvum hava trýst prísin í botn*

*Sjálvsmynd*